KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 29.04.2021 kl. 17:30
Málnr.: 20/01212 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir: Símun á Høvdanum møtti til málini 58/21 (fyri Oddmar á Lakjuni), 63/21 (fyri Atla S. Justinussen), 66/21 (fyri Oddmar á Lakjuni/Eyðstein Ó. Poulsen) og 67/21 (fyri Eyðstein Ó. Poulsen)
Ikki møtt:
Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
55/21	21/00407-4	Umfígging og lántøka, 2021 - apríl
56/21	21/00073-3	Raðfesting - UBN
57/21	17/01189-42	Dagstovnur Oman Valrætt - annullering av sáttmála
58/21	21/00360-1	Útnevning av umboðum í Integratiónsnevndina
59/21	20/00819-23	Stovnan av stýrisbólki fyri áskoðaraskýlið í Jógvan Waagsteinsgøtu
60/21	19/00313-15	Dagføring av viðtøkum fyri Íverksetarahúsið
61/21	20/00006-77	Mannagongdir á kirkjugarðsøkinum - broyting viðv. gravsteinum
62/21	21/00218-7	Broyting av byggisamtykt – umbøn um strikan av økisparti A31
63/21	21/00434-1	Broyting av byggisamtykt – víðkan av B15, Árnafjørður
64/21	21/00439-2	Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 1006bg og 1006a
65/21	21/00515-1	Norðhavnin - víðkan við tunnilsgróti
66/21	21/00348-6	Keyp og umvæling av Klaksvíkar Hermetikk (Bollafabrikkin)
67/21	21/00489-3	Víðarisøla av grundstykki
68/21	14/00665-257	Vegir til eldri sethúsaøkir - status
69/21	18/01148-20	Atlantis og avleiðingar av koronu fyri filmsvinnuna – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

70/21	21/00532-1	Øking av rávatnsgoymslu í Strandadali – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
71/21	21/00533-1	Umsjónarfólk til vallir og spælipláss – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
72/21	21/00534-1	Setan av tveimum dagrøktarum – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
73/21	20/00355-2	Asfaltering av økinum rundan um Spinnaríið – *eykajáttan, seinna viðgerð*
74/21	19/00492-14	Stigabilur til Klaksvíkar Sløkkilið – *eykajáttan, seinna viðgerð*
75/21	20/01227-17	Vetrarhaldið í jan/feb 2021, serlig avbjóðing – *eykajáttan, seinna viðgerð*
76/21	21/00343-14	Frostbinding, eyka útreiðslur hjá Vatndeildini – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Til viðgerðar

55/21
21/00407-4 Umfígging og lántøka, 2021 - apríl

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	27.04.2021	48/21
2 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	55/21

21/00407-4 Umfígging og lántøka, 2021 - apríl

Frágreiðing um málið:
Vísst verður til nærri útgreinandi skriv frá umsitingini, dagf. 22. apríl 2021.

Sum kunnugt er neyðugt at upptaka lán fyri at fíggja virksemið næstu 9 mánaðirnar.

Upprunaætlanin javnvigar við 105 tkr, men arbeitt verður við at dagføra fíggjarætlanina, so at avsetingarnar svara til virksemið í árinum. Tosað er um at hækka íløgurnar 78 mió. kr. til samanlagt 156 mió. kr., og við hesum fer fíggjarætlanin at vísa 78 mió. kr. í halli.

Tað er treytað av, at íløgurnar verða brúktar, og at inntøkur og rakstur verður sum budgetterað.

Uppgerðin vísir, at neyðugt er at upptaka lán upp á 70 mió. kr. Mælt verður til at taka 50 mió. kr., og at umsitingin fær heimild at taka aðrar 20 mió. kr. seinni í árinum.

Lógargrundarlag:
§ 43. Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum.

Stk. 2. Er nettoskuldin meira enn ein álíkning eftir einum av landsstýrismanninum árliga ásettum skattaprosenti, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum.

Fíggjarligar avleiðingar:
Skuldin hækkar 70 mió. kr., verður við ársenda ca. 235 mió. kr. Um dagførda fíggjarætlan vísir 78 mió. kr. í halli, og pengarnir verða brúktir, verður nettoskuldin ca. 12 mió. kr. omanfyri eina álíkning. Tá kann landsstýrið seta kommununi krøv – t.d. góðkenna eykajáttanir og lántøkur

Tilmæli:
Heitt verður á fíggjarnevnd og býráð um at geva umsitingini heimild at taka upp lán á 70 mió. kr. Av hesum verða 50 mió. kr. upptiknar nú. Restin (20 mió. kr.) verður tikið, tá tørvur er á pengunum – sannlíkt í august/september.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 22-04-2021. Lántøkan skal bjóðast út, tilboð skal biðjast um bæði fasta og variabla rentu, og málið skal leggjast fyri nevndina aftur til endaliga støðutakan til innkomin tilboð.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá JS, SVJ og TJL: *Mælt verður til, at peningurin til avsetingina til Bollafabrikkina og Fastognir verður fluttur til fimleikahøll (1 mió.kr.), kappróðrarneyst (1 mió.kr.), miðbýur (klárgerð til hotellverkætlan – 3 mió.kr.) og vegir til gomul sethúsaøkir (1,7 mió.kr.)*; tað fall við 3 atkvøðum fyri (JS, SVJ og TJL) og 8 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB og ÓML).

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá FíN 27-04-2021; tað varð einmælt samtykt.

56/21
21/00073-3 Raðfesting - UBN

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.04.2021	51/21
2 Fíggjarnevndin	27.04.2021	59/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	56/21

21/00073-3 Raðfesting - UBN (stutt- og langtíðarætlan)

Frágreiðing um málið:
Á fundi mikudagin 07.04.2021 millum nevndarformenn/-kvinnur og borgarstjóra bleiv uppskot til raðfesting fyri málsøkið hjá UBN viðgjørt – sí viðhefta uppskot til raðfesting hjá nevndini.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlan 2021

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin játtan er til *býggibúning bústaðir*, og krevst tí, at hetta málið verður viðgjørt av fíggjarnevnd og býráð, og at peningur verður játtaður tilsamans kr 29.125.000

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir nevndini til at taka undir við málinum, og at neyðugur peningur verður umraðfestur / ella fíggjað sum lántøka á fíggjarætlanin 2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. apríl 2021:
Ein meiriluti, GvK, ASB og OáL, tekur undir við raðfestingini í tilmælinum, dagf. 08-03-2021.
SVJ og JS taka støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá JS: "*Mælt verður til, at fimleikarhøllin fær 1 mió.kr. úr samlaðu játtanini áljóðandi 3,2 mió.kr. á Fastognum*"; tað fall við 3 atkvøðum fyri (JS, SVJ og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB). ÓML atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá FíN 27-04-2021; tað varð einmælt samtykt.

57/21
17/01189-42 Dagstovnur Oman Valrætt - annullering av sáttmála

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.04.2021	50/21
2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	20.04.2021	24/21
3 Fíggjarnevndin	27.04.2021	60/21
4 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	57/21

21/00342-10 Dagstovnur Oman Valrætt - annullering av sáttmála

Frágreiðing um málið:
Í samband við at nýtt býráð er valt fyri Klaksvíkar kommunu, er er avgerð tikin um at sleppa verkætlanini og í staðin raðfesta at fáa gjørt ein dagstovn á Norðoyri.

Sáttmáli varð gjørdur við Norðhús, og bleiv arbeiðið sett í gongd fyrst í november í fjør. Arbeiðið er í samráð við borgarstjóran steðgað.

Fyri at staðfesta umraðfestingina krevst, at nevndir og býráð viðgera málið og heimila teknisku fyrisiting at samráðast við arbeiðstakaran um annullering av sáttmálanum.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
ABF06

Fíggjarligar avleiðingar:
Játtan skal umraðfestast til dagstovnin á Norðoyri í staðin, men má kommunan gjalda fyri gjørt arbeiði,

Tilmæli:
Mælt verðir til, at nevndin heimilar fyrisitingini at gera ein annulleringsavtalu við arbeiðstakaran og annullera sáttmálan.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. apríl 2021:
Ein meiriluti, GvK, ASB og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-04-2021.

SVJ og JS taka støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 20. apríl 2021:
Ein meiriluti, EÓP, JC, ASB, tekur undir við meirilutanum í UBN 19.04.2021.
Ein minniluti, JS, TJL, tekur undir við minnilutanum í UBN 19.04.2021.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við meirilutunum í UBN 19-04-2021 og B&U 20-04-2021.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur undir við minnilutanum í B&U 20-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 27-04-2021; tað varð einmælt samtykt.

58/21
21/00360-1 Útnevning av umboðum í Integratiónsnevndina

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	16.03.2021	12/21
2 Fíggjarnevndin	23.03.2021	47/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	33/21
4 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	58/21

21/00360-1 Integratión – nýskipan av integratiónsnevndini og umsitingini á økinum

Frágreiðing um málið:
Býráðið valdi á fundinum 25. mars 2021 Karl H. Johansen og Jógvan Skorheim í Integratiónsnevndina. Eftir er nú at útnevna fimm umboð í nevndina, sum umboða bæði føroyingar og tilflytarar búsitandi í kommununi.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt.
Harumframt vórðu hesi vald í Integratiónsnevndina tað, ið eftir er av býráðssetuni: Karl Johansen og Jógvan Skorheim. Hini umboðini verða vald/útnevnd á næsta býráðsfundi.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Oddmar á Lakjuni luttók ikki í viðgerðini vegni ógegni. Símun á Høvdanum tók í staðin sæti í býráðnum í samband við málið.
Einmælt samtykt at velja Marjuna Lómaklett, Heina Z. Dahl, Cathy Steinberg, Daria Zellmer og David Im í Integratiónsnevndina.

59/21
20/00819-23 Stovnan av stýrisbólki fyri áskoðaraskýlið í Jógvan Waagsteinsgøtu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	20.04.2021	41/21
2 Fíggjarnevndin	27.04.2021	55/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	59/21

20/00819-23 Stovnan av stýrisbólki fyri áskoðaraskýlið í Jógvan Waagsteinsgøtu

Frágreiðing um málið:
Útbyggingin av stadionøkinum í Djúpumýru er komin hartil, at bygging av áskoðaraskýli í Jógvan Waagsteinsgøtu er byrjað.

Byggireglurnar hjá Klaksvíkar kommunu siga, at ein 5 manna nevnd skal veljast at hava ábyrgd fyri projektum omanfyri 10 mió. kr., tá ið hesi projekt verða framd. Einstaka byggistigið, sum verður gjørt í løtuni kemur ikki upp um 10 mió. kr., men samlaða verkætlanin fyri økið er langt yvir 10 mió. kr.

Kommunan hevur tó ongantíð brúkt áður nevndu byggireglurnar. Men ístaðin er ein byggiharraráðgevi settur, ið samstarvar við ein stýrisbólk.

Leiðslan í kommununi hevur í hesum sambandi heitt á viðkomandi nevndir og býráð um at gera frávik frá byggireglunum, tí talan er um eina strangari skipan. Høvuðsuppgávan hjá stýrisbólkinum er at tryggja, at kommunan fær arbeiðið til rættan kostnað, til røttu tíð og við umbidnari dygd.

Skipað verður fyri fundi einaferð um mánaðin, fyrsti fundardagur verður væntandi í apríl. Sambært praksis hjá kommununi manna hesi stýrisbólkin:

1. Borgarstjóri, Karl H. Johansen (formaður)
2. Kommunustjóri, Tummas T. Eliasen
3. Formaður/kvinna fyri nevndina, sum eigur verkætlanina, Jóhanna Christiansen, MeN
4. Stjórin fyri fyrisitingina, sum eigur verkætlanina, Eirikur í Jákupsstovu
5. Tekniski stjórin, Óla Jákup Bech
6. Stjórin fyri stovnin, sum byggir (eingin í hesum føri)
7. Byggiharraráðgevi, Svend Sivertsen, Fuglark (fundarskrivari)

Um mett verður, at aðrir persónar skulu luttaka á fundi ella á einstøkum fundi, so kallar formaðurin fyri stýrisbólkin hesar inn.

Tilmæli:
Fyrisitingin mælir býráði og nevndum til at taka undir við tilmæltu samansetingini av stýrisbólki.

Mentanarnevndin 20. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-04-2021.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 20-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Atkvøtt varð soljóðandi broytingaruppskot frá JS: "*Mælt verður til, at Klaksvíkar Ítróttarfelag fær eitt umboð í stýrisbólkin*"; tað fall við 5 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL, ÓML og EÓP) og 6 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC og ASB).

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá FíN 27-04-2021; tað varð einmælt samtykt.

60/21
19/00313-15 Dagføring av viðtøkum fyri Íverksetarahúsið

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	21.04.2021	25/21
2 Fíggjarnevndin	27.04.2021	53/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	60/21

19/00313-15 Dagføring av viðtøkum fyri Íverksetarahúsið

Frágreiðing um málið:
Í aðalfundinum hjá Íverksetarahúsinum varð samtykt at broyta viðtøkurnar fyri grunnin soleiðis í grein 6:

> §6 Fráboðan
> Tað verður við lýsing *í miðlunum* – eftir nevndarinnar avgerð - kunnað, hvørt og nær tiltøk og ætlanir verða framdar, umframt vanlig kunning um virksemi grunsins.
>
> Hetta er ein broyting frá:
>
> §6 Fráboðan
> Tað verður við lýsing *í bløðunum* – eftir nevndarinnar avgerð - kunnað, hvørt og nær tiltøk og ætlanir verða framdar, umframt vanlig kunning um virksemi grunsins.

Sambært viðtøkunum fyri Íverksetarahúsið, sambært § 14, skulu broytingar í viðtøkum grunsins millum annað góðkennast av Klaksvíkar kommunu.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndir og býráð taka undir við hesi lítlu praktisku broyting í viðtøkunum fyri Íverksetarahúsið.

Havna- og Vinnunevndin 21. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf, 06-04-2021.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við HaVN 21-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá FíN 27-04-2021 einmælt samtykt.

61/21
20/00006-77 Mannagongdir á kirkjugarðsøkinum - broyting viðv. gravsteinum (broyting av kirkjugarðsreglugerð)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd 2017-2020	18.11.2020	75/20
2 Fíggjarnevndin 2017-2020	24.11.2020	95/20
3 Tekniska Nevnd	21.04.2021	31/21
4 Fíggjarnevndin	27.04.2021	65/21
5 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	61/21

20/00006-77 Broyting í reglugerð um kirkjugarðar

Frágreiðing um málið:
Vísst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 10. nov. 2020, ið greiðir nærri frá málinum. Í stuttum snýr málið seg um, at broyta umsitingarligu mannagongdirnar í sambandi við uppsetan av gravsteini á grøv. Verður broytingin samtykt, skal uppseting av gravsteini ikki longur viðgerast í kirkjugarðsnevndini.

Lógargrundarlag:
-

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Umsitingin mælir til at broyta mannagongdina soleiðis, at borgarar ikki skulu søkja um loyvi at seta gravstein á grøvina hjá avvarðandi.

Tekniska Nevnd 18. november 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-11-2020.

Fíggjarnevndin 24. november 2020:
Nevndin tekur undir við TN 18-11-2020. Nevndin mælir eisini til, at hvítir krossar verða settir á gravirnar, til gravsteinar eru komnir á.

Tekniska Nevnd 21. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við FíN 24-11-2020.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við TN 21-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Málið tikið av skrá.

62/21
21/00218-7 Broyting av byggisamtykt – umbøn um strikan av økisparti A31

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.04.2021	52/21
2 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	62/21

21/00218-7 Broyting av byggisamtykt – umbøn um strikan av økisparti A31

Frágreiðing um málið:
Víst verður til samtykt hjá UBN 15. mars 2021 um, at tekniska fyrisiting setur seg ísb. við Búnaðarstovuna fyri at kanna, hvørjir møguleikar eru fyri at ganga umsóknini á møti uttan at strika økispart A31 og broyta økismark fyri D39.

Niðurstøðan eftir telefonsamskifti við Búnaðarstovuna var, at tey útfrá royndum ikki vænta, at málið/umsóknin fer at fáa viðhald hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, so leingi umtalaða økið ikki liggur sum landbúnaðarøki.
Búnaðarstovan viðmerkti somuleiðis, at kommunan átti at tikið støðu til, hvar hon vil og ikki vil hava landbúnað, man kann ikki hava bæði sama stað.
Síðani setti fyrisitingin seg ísb. við Umhvørvisstovuna (matrikul), og her vóru boðini greið, umsóknin hevði ikki fingið viðhald. Byggisamtyktarbroyting er neyðug fyri at ganga umsóknini á møti.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m.
Løgtingslóg um landsjørð v.m.
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir frá, at økisparturin A31 verður strikaður og útlagdur til landbúnaðarøki.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá UBN 19-04-2021 einmælt samtykt.

63/21
21/00434-1 Broyting av byggisamtykt – Víðkan av B15, Árnafjørður

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Árnafjarðarnevndin	12.04.2021	4/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.04.2021	53/21
3 Havna- og Vinnunevndin	21.04.2021	23/21
4 Tekniska Nevnd	21.04.2021	30/21
5 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	63/21

21/00434-1 Broyting av byggisamtykt – Víðkan av B15, Árnafjørður

Frágreiðing um málið:
Víst verður til mál 17/00668 Útbygging og broyting av bátahylinum í Árnafirði.
Fyri at fremja útbyggjanina av bátahylinum í Árnafirði er neyðugt at økja um økispartin B15, vinnu- og mentunnarøki.
Somuleiðis verður reguleráð í økismarkinum í D27 og D28, ið liggur uppat B15. Til dømis liggur matr.nr. 19 (Fiskavirkið) bæði í D28 og B15 øki. Markið millum D27 og B15 verður eisini broytt, so tað fær ein javnan skilnað.
Eingin broyting er í ásetingunum.

Broytingaruppskot

Galdandi byggisamtykt

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Fyrisitingin mælir nevndini at taka undir við, at B15 verður víðkað, og reguleringar gjørdar í D27 og D28, sum lýst omanfyri.

Árnafjarðarnevndin 12. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-04-2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við ÁrN 12-04-2021.

Havna- og Vinnunevndin 21. apríl 2021:
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini.
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 19-04-2021

Tekniska Nevnd 21. apríl 2021:
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við HaVN 21-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni. Símun á Høvdanum tók sæti í samband við viðgerðina av málinum.
Tilmælið frá TN 21-04-2021 einmælt samtykt.

64/21
21/00439-2 Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 1006bg og 1006a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.04.2021	56/21
2 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	64/21

21/00439-2 Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 1006bg og 1006a

Frágreiðing um málið:
Víst verður til umsókn dagf. 23-03-2021 frá eigaranum av matr.nr. 1006bg um loyvi at keypa uml. 15 m^2 av kommunala økinum – matr.nr. 1006a - at leggja afturat ogn síni framvið norðurmarkinum.

Talan er um víðkan av norðasta kommunala grundøkinum niðanfyri vegin Millum Hjalla.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Inntøka uml. kr. 5.700,-

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting hevur onki ímóti, at umsóknin verður gingin á møti, treytað av, at keyparin rindar
- kr. 380,- pr. fermetur, sum er galdandi søluprísur fyri byggiøkið Millum Hjalla,
- útreiðslurnar til Umhvørvisstovuna fyri ummatrikulering og
- at kommunan ongar útreiðslur kemur at hava av ummatrikuleringini

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá UBN 19-04-2021 einmælt samtykt.

65/21
21/00515-1 Norðhavnin - víðkan við tunnilsgróti

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	21.04.2021	24/21
2 Fíggjarnevndin	27.04.2021	61/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	65/21

21/00515-1 Norðhavnin - víðkan við tunnilsgróti

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 9. apríl 2021, verður greitt nærri frá málinum.
Útbyggingin av Norðhavnini er mál, sum undanfarnu nevndir og býráð hava arbeitt við, og seinastu árini er víst til málið um nýggjar tunlar norður um fjall, tí kommunan hevur roknað við gróttilfari úr nýggju tunlunum. Nevnast kann í hesum sambandi, at Býráðið tann 2. mai 2019 hevur samtykt, at Norðhavnin er raðfest sum móttøkupláss av gróti, sum kemur úr tunlunum saman við bátahylinum í Árnafirði o.ø.

Undir fyrireikingini av verkætlanini "Tunlar norður um fjall" hevur leiðslan og fyrisitingin samskift við Landsverk, Umhvørvisstovuna, Friðingarmyndugleikar og havnaverkfrøðing um málið, fyri á tann hátt at tryggja at alt er klárt, tá grótið kemur úr tunlunum.

Upplýst verður, at Landsverk hevði koyring og móttøku av gróti í Norðhavnini við í útboðnum av tunnilsverkætlanini. Umsitingin fer at kunna nevndina munnliga um hendan partin, tí samráðingarnar við tilboðsgeva eru ikki lidnar.

Viðkomandi nevndir eru eisini kunnaðar um, at Landsverk hevur gjørt kommununi greitt, at ein stórur partur av mold- og eyrrúgvuni í Árnafirði skal flytast (25.000 m^3), og at Landsverk fer at senda rokningina fyri nevnda arbeiði til Klaksvíkar kommunu.

Eisini er avtaluuppskot viðv. arbeiðinum komið frá Landsverki. Kommunan hevur á fundi við Landsverk gjørt viðmerkingar til avtaluna. Vent verður aftur til málið, tá komið er longri á leið við avtaluni.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin viðmerking.

Tilmæli:
Mælt verður til, at leiðslan og fyrisitingin arbeiða víðari við málinum, har uppleggið verður, at kommunan fær eina nøktandi avtalu, vísandi til atknýttu verkætlanirnar, sum eru Norðhavnin og bátahylurin í Árnafirði.

Havna- og Vinnunevndin 21. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-04-2021.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við HaVN 21-04-2021.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur undir við HaVN 21-04-2021 og mælir til, at gróttilfarið verður koyrt í Norðhavnina fyrst.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið í FíN 27-04-2021; tað fall við 3 atkvøðum fyri (JS, SVJ og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og AB). ÓML atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá FíN 27-04-2021; tað varð einmælt samtykt.

66/21
21/00348-6 Keyp og umvæling av Klaksvíkar Hermetikk (Bollafabrikkin)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	21.04.2021	26/21
2 Fíggjarnevndin	27.04.2021	56/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	66/21

21/00348-6 Keyp og umvæling av Klaksvíkar Hermetikk (Bollafabrikkin)

Frágreiðing um málið:
Formaðurin í Havna- og vinnunevndini og leiðslan í kommununi heittu fyrr í ár á umsitingina at fyrireika mál um at keypa ovaru hæddina av Klaksvíkar Hermetikk og fyrireika eina møguliga umvæling av hesum bygningi, sum er á varðveitingarlistanum hjá kommununi men er í sera ringum standi.

Hetta er ikki fyrsta royndin at finna eina loysn á hesum málinum, men eftir at hava kannað málið nakað tóktist greitt at vera einfaldast at fáa eina góða loysn, um kommunan keypir ovaru hæddina av bygninginum til kommunal endamál, so sum goymslu hjá Klaksvíkar havn og møguliga okkurt meira mentarligt í mun til siðsøguliga virðið á bygninginum, og síðan at leiga tann partin út, sum Klaksvíkar havn ikki hevur tørv á. Samstundis verða tekja, ovara hædd og øll fasadan á bygningum umvæld fyri at varðveita útsjóndina á bygninginum.

Til hetta endamál hevur kommunan verið í samband við allar eigarar av skúrum, sum formelt eru eigaraíbúðir í hesum føri, og er umvegis eina arbeiðsnevnd fyri skúreigararnar komin til eina loysn, sum allir skúreigararnir kunnu taka undir við. Ein avtala, treytað av myndugleikagóðkenning og góðkenning frá býráðnum, varð undirskrivað um hetta 17. mars.

Tó resta nakrar undirskriftir formelt í, orsakað av at viðurskiftini viðvíkjandi tinglýsing av ognunum í summum førum eru ógreið. Kommunan er í samskifti við Umhvørvisstovuna um hetta. Umhvørvisstovan hevur greitt frá, at hesi viðurskifti eru til at avgreiða, men taka nakað av tíð at fremja.

Um arbeiðið gongur væl eru øll tey formellu viðurskiftini avgreidd fyri summarfrítíðina, og tað er ongin forðing fyri, at tilboð verða heintað inn uppá umvælingina, samstundis sum løgfrøðiligu viðurskiftini verða endaliga greidd.

Í samband við framtíðar umsiting er uppleggið, at skúreigararnir og kommunan rinda hvør sína helvt av einum føstum gjaldi til ein nýggjan umsitingargrunn, sum kommunan administrativt umsitur, meðan valdið í grunninum er skipað soleiðis, at atkvøðurnar í grunninum eru býttar við hvør sínari helvt til kommununa og skúreigararnar. Tað er tó altíð umboðið hjá kommununi, sum er formaður fyri nevndina.

Sølusáttmáli, leigusáttmáli, viðtøkur fyri nýggju umsitingarnevndina og annað tilfar eru hjáløgd í málinum.

Lógargrundarlag:
Tinglýsingarlógin
Eigaraíbúðarlógin
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar í hesum umfari, men væntandi umleið 3,5 mió. kr. fyri samlaðu loysnina í økinum, tá komið er á mál við formligu viðurskiftunum.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndir og býráð taka undir við, at arbeitt verður víðari við málinum eftir omanfyri nevnda leisti og sáttmálum, og at tilboðini um umvæling verða løgd fyri aftur til støðutakan, tá hesi eru tøk.

Havna- og Vinnunevndin 21. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-04-2021.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ, OáL og TJL, tekur undir við HaVN 21-04-2021.
JS tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Karl H. Johansen, Oddmar á Lakjuni og Eyðstein Ó. Poulsen luttóku ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni. Símun á Høvdanum tók sæti til viðgerðina av málinum, og Atli S. Justinussen, varaborgarstjóri, yvirtók fundarleiðsluna.

Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 27-04-2021; tað varð einmælt samtykt.

67/21
21/00489-3 Víðarisøla av grundstykki

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.04.2021	55/21
2 Fíggjarnevndin	27.04.2021	64/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	67/21

21/00489-3 Víðarisøla av grundstykki

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 12. apríl 2021.
Ánararnir av grundstykkinum biðja um loyvi frá býráðnum til at selja stykkið, ið tey nýliga hava grivið út, tí tey hava fingið møguleika at keypa hús ístaðin. Ætlan teirra er at seta grundstykkið til sølu við tilhoyrandi tekningum til eini hús. Talan er um eitt grundstykki, ið Klaksvíkar kommuna seldi Norðoya Sparikassa í 2015.

Vísst verður til servitutt í ognarbrævinum:
1. Keyparin – Norðoya Sparikassi – kann selja stykkið víðari til triðja persón til bygging av sethúsum. Eftir tað kann grundøkið ikki í verða selt uppaftur, áðrenn bygt er á tað sethús ella annað eins týdningarmikið hús, uttan at býráðið játtar.

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevnd og býráð taka støðu til
1. um punkt 1 í ognarbrævinum skal strikast
2. ella at váttan um sølu verður latin, tá ið keypari er funnin.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við pkt. 2 í tilmælinum, dagf. 12-04-2021.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 19-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Eyðstein Ó. Poulsen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni. Símun á Høvdanum tók sæti til viðgerðina av málinum.
Tilmælið frá FíN 27-04-2021 einmælt samtykt.

68/21
14/00665-257 Vegir til eldri sethúsaøkir - status

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.04.2021	59/21
2 Tekniska Nevnd	21.04.2021	K-8/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	68/21

14/00665-257 Vegir til eldri sethúsaøkir - Status

Frágreiðing um málið:
Sambært ynski frá viðkomandi nevndum og býráði er málið stovnað sum eitt felagsmál fyri økir í kommununi, sum ongan koyriveg hava til sethúsaognirnar.

Tekniska fyrisiting skal við hesum koma við einari kunning um málið um vegir til eldri sethúsaøkir. Málið er sett í bíðistøðu vegna fíggjarligar umstøður og vegna tað, at einstøk verkætlan kostar munandi meira enn tað, ið væntað varð.

Málið er tó sent nevndunum til viðgerðar fyri at geva høvi til umrøðu og møguliga støðutakan.

Síðani seinastu viðgerð eru aðrir fyrispurnginar skrásettir, m.a. verður sóknast eftir, nær vegurin omanfyri Klaksvíksvegin verður asfalteraður. Viðkomandi er munnliga kunnaður um, at kommunan fær ikki komið við einari tíðarætlan upp á arbeiðið.

Kommunan hevur samskift við nógvar borgarar, sum eru partar av málinum, og uttan iva eru tað eisini onnur enn tey, sum eru nevnd omanfyri, sum hava vent sær til kommununa viðvíkjandi málinum, síðani seinastu viðgerð.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.
Fyrisitingarlógin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin peningur er tøkur á fíggjarætlanini til framhald av arbeiðum.

Tilmæli:
Við hesum verður málið sent nevndunum til kunningar og møguliga støðutakan.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. apríl 2021:
Ein meiriluti, GvK, ASB og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-04-2021, og at málið verður tikið uppaftur í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2022.
Ein minniluti, SVJ og JS, tekur undir við tilmælinum men mælir til, at 100 tús.kr. verða funnar til liðugtgerð av vegnum omanfyri Klaksvíksvegin (pkt. 11 í listanum í tilmælinum) innan *Vegir, Íløgur.*

Tekniska Nevnd 21. apríl 2021:
Málið verið til kunningar.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá UBN 19-04-2021; tað varð einmælt samtykt.

69/21
18/01148-20 Atlantis og avleiðingar av koronu fyri filmsvinnuna – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	20.04.2021	39/21
2 Fíggjarnevndin	27.04.2021	52/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	69/21
4 Klaksvíkar Býráð	27.05.2021	

18/01148-20 Atlantis og avleiðingar av koronu fyri filmsvinnuna (eykajáttan)

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 12. apríl 2021, verður greitt frá málinum.

Í stuttum snýr málið seg um, at biografurin Atlantis er í fíggjarliga tungum sjógvi. Avmarkingar í samband við koronu, umframt at nærum ongir filmar eru komnir út seinasta árið, umframt avbjóðingar

við rættindum til heimasíðuna hjá Atlantis, hava havt við sær, at biografurin Atlantis – eisini síðan eykajáttanina á 250.000 kr. í fjør – skyldar sera nógvan pening.

Sum nevnt omanfyri hava orsøkir uttanífrá havt við sær, at inntøkurnar hava verið nærum ongar, meðan føstu útreiðslurnar halda fram at vera. Leiðarin fyri Atlantis greiðir frá, at biografurin í verandi løtu skyldar Grunninum Mentanarhús í Klaksvík fyri mvg av 2., 3. og 4. ársfjórðingi í 2020.

Orsøkin til, at skuldin er til grunnin Mentanarhús í Klaksvík er, at Atlantis skipanarliga er partur av grunninum, tó við einum øðrum v-tali, og Taks hevur tí tikið skuldina í mvg inn frá grunninum, tá Atlantis ikki hevur goldið.

Hartil hevur Atlantis aðra skuld fyri bókhald í 2020, umframt skuld til ymiskar veitarar.

Um so er, at ynski er um at framtíðartryggja biograf í Klaksvík, so kundi ein møguleiki verið at kanna møguleikan fyri at skipa biografin á sama hátt sum til dømis svimjihøllina, har talan er um ein kommunalan stovn, har bókhald, játtan, raðfestingar og so framvegis fara fram beinleiðis úr kommununi, heldur enn at virka umvegis ein grunn.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Fyri at rinda hvørjum sítt komandi tíðina hevur biografurin Atlantis tørv á umleið kr. 100.000 í beinleiðis stuðli, sum ikki er avsettur. Tí er lagt upp til eykajáttan av *tøkum peningi*.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndir og býráð játta í minsta lagi 100.000 kr. í eyka stuðli til Atlantis, og at støða samstundis verður tikin til, um fyrisitingin skal kanna møguleikan fyri einum leisti, sum framtíðartryggjar biografvirksemi í Klaksvík.

Mentanarnevndin 20. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við at játta kr. 200.000,- sum eykajáttan og at fyrisitingin kannar framtíðar leistin.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 20-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá FíN 27-04-2021 einmælt samtykt.

70/21
21/00532-1 Øking av rávatnsgoymslu í Strandadali – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	21.04.2021	29/21
2 Fíggjarnevndin	27.04.2021	62/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	70/21
4 Klaksvíkar Býráð	27.05.2021	

21/00532-1 Øking av rávatnsgoymslu - Strandadalur

Frágreiðing um málið:
Miðvísa arbeiði kommununnar at útvega meira rávatn heldur fram vísandi til vaksandi nýtsluna av drekkivatni, og er tað serliga, tá turkur og frostbinding ger seg galdandi.

Í samband við samstarvsavtaluna millum Klaksvíkar kommunu og SEV, so kann kommunan taka vatn úr byrgingini hjá SEV í Strandadali, og nýtir Klaksvíkar kommuna sama inntak sum vatnorkuverkið á Strond.

Tá byrgingin hjá SEV er full, og tað rennur útav, er samlaða nøgdin um 54.000 m^3 við hæddini 224 metrar. Tá hæddin er komin niður á 219,8 metrar kunnu vit ikki fáa meir úr inntakinum, sjálvt um tað eru meira enn 5.000 m^3 av vatni eftir í byrgingini.

Sum kunnugt hevur tað eisini víst seg, at SEV stundum tømir byrgingina, og tá gerst støðan sera álvarsom. Í hesum sambandi kunnu vit upplýsa, at avtalan við SEV verður endurskoðað í løtuni. Upplýst verður eisini, at kommunan og SEV fylgja betur við vatnstøðuni í Strandadali nú.

Vit hava nú fingið loyvi frá SEV at lyfta eftirstandandi vatnið úr byrgingini og leiða tað í verandi vatnleiðing, sum sýgur vatnið úr byrginini og oman til vatnverkið við Ánagjógv. Hetta merkir, at ein vatnleiðing Ø160 verður løgd omaná byrgingina og víðari niður í vatnið við einari boyu og einum loddi á endanum á rørinum, so rørið allatíðina er undir vatnskorpuni.

Á nevnda hátt fær kommunan tey 5.000 m^3, sum eru eftir í byrgingini í Strandadali, og fær harvið eisini vatnið, sum rennur í Strandadalsá omanfyri byrgingina.

Málið fer at bøta um neyðstøðuna, sum kann taka seg upp, um vatnmangul verður. Í hesum sambandi kann verða nevnt, at vatntøkan úr Kunoy bøtir munandi um støðuna, men óvist er, um nóg mikið av rávatni er tøkt, um støðan við drúgvum turki gerst veruleiki.

Málið fer eisini at bøta munandi um støðuna, tá frostbinding ger um seg, sum í januar/februar 2021.

Lógargrundarlag:
Kunngerð um vatnveiting.

Fíggjarligar avleiðingar:
Leiðarin á Vatndeildini hevur mett arbeiðið til 400 tkr.

Tilmæli:
Við hesum verður mælt til, at fyrisitingin arbeiðir víðari við málinum, og fær heimild til at seta arbeiðið í verk, um so er, at langtíðar veðurvánir – ella aðrar ábendingar - geva ábending um drúgvan turk í summar. Mælt verður til, at arbeiðið verður fíggjað av *Vegir Íløgur*, sum merkir, at ein onnur verkætlan má víkja.
Áðrenn farið verður í gongd við verkætlanina, skal málið takast upp saman við formanninum í TN, sum skal góðtaka ætlanina (hetta verður gjørt, tí eingin fundur er í TN millum 16. juni 2021 til 15. september 2021).

Tekniska Nevnd 21. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-04-2021, men at hetta verður fíggjað við eykajáttan sum *lántøka*.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við TN 21-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá FíN 27-04-2021 einmælt samtykt.

71/21
21/00533-1 Umsjónarfólk til vallir og spælipláss – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	20.04.2021	40/21
2 Fíggjarnevndin	27.04.2021	57/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	71/21
4 Klaksvíkar Býráð	27.05.2021	

21/00533-1 Umsjónarfólk til vallir og spælipláss (eykajáttan)

Frágreiðing um málið:
Seinastu árini eru stórar íløgur gjørdar í stadionøkið, spælipláss, sparkivallir og í eina skoytubreyt. Í summar koma eftir ætlan bæði rennibreyt og ein fótbóltsvøllur afturat.

Umsjónin av hesum økjum hevur verið eitt sindur tilvildarlig, har fótbóltsvøllurin í Djúpumýru ávís tíðarskeið hevur verið heilt væl røktur, meðan spælipláss og sparkivallir hava verið minni væl røkt.

Sum eisini er greitt frá í málinum um nýtslu í mun til játtan á mentanarøkinum fyri apríl 2021, so varð á temafundinum um rakstur fyri 2021 samtykt, at avsetingin til stadionøkið skuldi vera 620.000 kr. um árið heldur enn tær 470.000, sum høvdu verið frammanundan. Henda økta avseting var ætlað til at umskipa víðkaða stadionøkið, so nakað av játtan var tøk til eitt fast umsjónarfólk til stadion, vallir, spælipláss og skoytubreytina, tá tann tíðin er.

Ein løn, sum var á umleið 50.000 kr. skuldi tó flytast til ítróttarhallir, við tað at umsjón av innanduraøkinum í nýggja skýlinum og kjallarin í KÍ høllini ikki longur skuldi fíggjast av "stadionøkið", men av "ítróttarhallir".

Økingin á 200.000 skuldi fyrst og fremst setast av til fyrsta hálva árið av umsjónarfólkinum til samlaða økið.

Tá fíggjarætlanin varð endaliga samtykt vísti tað seg, at bara flytingin burtur frá stadionøkinum og ikki tilføringin av játtan til nýggja fólkið var komin við.

Tað er, sum áður kunnað, ikki einasta orsøkin til, at nýtslan á stadionøkinum hevur samsvarað sera illa við við avsetingina higartil í ár, men er høvuðsorsøkin, tí hóast onki fólk hevur verið sett beinleiðis í starv til stadionøkið, so hava fólk á vegadeildini brúkt sera nógvar tímar á økinum bæði til at fyrireika økið til kappingarárið, men eisini í stóran mun til kavarudding.

Krøvini til standin á stadionøkinum fara ikki at minka komandi árini, tá økið verður dupult so stórt sum í dag, samstundis sum vøllurin við Djúpumýru væntandi í summar verður góðkendur til altjóða dystir.

Verður hugt at kostnaðinum fyri eitt slíkt tímalønt umsjónarfólk, so er samlaði árligi kostnaðurin umleið 375.000 kr. í lønum, og hevði avsetingin verið sett til 620.000 í ár, so hevði í øllum førum verið nær við, at játtanin rakk til eitt hálvt ár við einum slíkum umsjónarfólki.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Verður mistakið frá fíggjarætlanarviðgerðini fyri 2021 rættað, so verður talan um eina eykajáttan á 200.000 kr. av *tøkum peningi*. Er ynskið at hava eina realistiska mynd av kostnaðinum av ítróttarøkinum, so er helst neyðugt við einari eykajáttan á 300.000 kr.
Í hesum sambandi kann til dømis nevnast, at nýtslan á stadionøkinum í fjør var yvir 800.000 kr., men talan var tó um eitt serstakt ár, har sera nógv tíð og orka varð nýtt til at hava viðurskiftini klár til Champions League dystin hjá KÍ.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndir og býráð taka undir við, at økið verður skipað við einum slíkum umsjónarfólki, og at starvið í næstum verður lýst leyst, umframt at neyðug játtan verður sett av til endamálið.

Mentanarnevndin 20. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-04-2021, og mælir til at kr. 200.000,- verða settar av sum eykajáttan í samband við *lántøku*.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 20-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá FíN 27-04-2021 einmælt samtykt.

72/21
21/00534-1 Setan av tveimum dagrøktarum - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	20.04.2021	29/21
2 Fíggjarnevndin	27.04.2021	51/21
3 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	72/21
4 Klaksvíkar Býráð	27.05.2021	

21/00534-1 Setan av tveimum dagrøktarum - tørvur á eykajáttan

Frágreiðing um málið:
Seinastu mánaðirnar hevur umsitingin, í samráð við politisku skipanina, arbeitt miðvíst við at víðka um plássini á barnaansingarøkinum. Hetta tí trýstið á bíðilistan seinastu mánaðirnar er alsamt økt.

Í drúgva tíð hevur tað gingið sera striltið við at fáa umsøkjarar til dagrøktarskipanina, men nú vísir tað seg – eftir ein miðvísan innsats, eitt nú við einum stuttfilmi, sum lýsir dagrøktarskipanina – at tveir

umsøkjarar nú hava søkt starv sum dagrøktarar, og dagrøktarleiðslan hevur havt samrøður við hesar, sum ætlandi byrja í starvi nú.

Hesin innsatsur er blivin gjørdur, tí mett hevur verið, at einasta skjóta leið til at útvega fleiri ansingarpláss var innan dagrøktarskipanina.

Nú er tó hend tann broyting, at meðan arbeitt hevur verið við hesari víðkan, er tað eydnast okkara politiku leiðslu at finna fram til eina skjóta loysn við at byggja ein dagstovn á Norðoyri, sum er sera gleðiligt.

Kortini vil umsitingin mæla frá at lata vera við at seta hesar báðar nýggju dagrøktararnar í starv – fyri tað fyrsta tí at tørvur er á ansingarplássum her og nú, og eisini tí hetta vildi verið eitt keðiligt signal frá kommununi yvir fyri umsøkjarunum og dagrøktini.

Tveir dagrøktarar geva íalt 6 nýggj ansingarpláss, og sambært tí, ið umsitur bíðilistan, er tørvur á at útvega hesi plássini beinanvegin.

Lógargrundarlag:
Dagstovnalógin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Vísandi til, at játtanin til dagstovnaøkið samanlagt er rættiliga tepur, verður mælt til at fíggja hesi bæði nýggju dagrøktarstørvini við eini eykajáttan.

Tilmæli:
Málið verður við hesum lagt fyri politisku skipanina til viðgerð og støðutakan við tilmæli um, at eykajáttan verður veitt til hesi nýggju plássini á dagstovnaøkinum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 20. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 12.04.2021.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2021:
Nevndin tekur undir við B&U 20-04-2021.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá FíN 27-04-2021 einmælt samtykt.

73/21
20/00355-2 Asfaltering av økinum rundan um Spinnaríið – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	16.03.2021	31/21
2 Tekniska Nevnd	17.03.2021	19/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	36/21
4 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	73/21

20/00355-2 Asfaltering av økinum rundan um Spinnaríið

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 25. mars 2021.

Mentanarnevndin 16. mars 2021:
Ein meiriluti, JC, GVK, ASB og AJ taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, SVJ, tekur undir við tilmælinum, men mælir til at fíggingin verður funnin á tekniska økinum.

Tekniska Nevnd 17. mars 2021:
Ein meiriluti, OáL, EÓP, ASJ og AJ, tekur undir við meirilutanum í MeN 16-03-2021, og at sjálvsognarstovnurin Spinnaríið rindar ein triðing (120 tkr.) av kostnaðinum.
Ein minniluti, TJL, tekur undir við minnilutanum í MeN 16-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælini í MeN 16-03-2021 og TN 17-03-2021; tey fullu við 3 atkvøðum fyri (SVJ, TJL og JS) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JC, EP og AB); AJ atkvøddi ikki.
Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælini í MeN 16-03-2021 og TN 17-03-2021; tey vórðu einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá BýR 25-03-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

74/21
19/00492-14 Stigabilur til Klaksvíkar Sløkkilið – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	17.03.2021	K-5/21
2 Fíggjarnevndin	23.03.2021	30/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	42/21
4 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	74/21

19/00492-14 Stigabilur til Klaksvíkar Sløkkilið

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 25. mars 2021.

Tekniska Nevnd 17. mars 2021:
Málið verið til kunningar.

Fíggjarnevndin 23. mars 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-03-2021, og fígging við eykajáttan.
JS og TJL taka støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt, og fíggingin verður at fáa til vega við lántøku.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá BýR 25-03-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

75/21
20/01227-17 Vetrarhaldið í jan/feb 2021, serlig avbjóðing – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	17.03.2021	23/21
2 Fíggjarnevndin	23.03.2021	32/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	43/21
4 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	75/21

20/01227-17 Vetrarhaldið í jan/feb 2021 - serlig avbjóðing

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 25. mars 2021.

Tekniska Nevnd 17. mars 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-02-2021, og verður peningurin tikin av *tøkum peningi*.

Fíggjarnevndin 23. mars 2021:
Nevndin tekur undir við TN 17-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá BýR 25-03-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

76/21
21/00343-14 Frostbinding, eyka útreiðslur hjá Vatndeildini – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	17.03.2021	22/21
2 Fíggjarnevndin	23.03.2021	33/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	44/21
4 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	76/21

21/00343-14 Frostbinding, eyka útreiðslur - Vatndeildin

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 25. mars 2021.

Tekniska Nevnd 17. mars 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 02-03-2021.

Fíggjarnevndin 23. mars 2021:
Nevndin tekur undir við TN 17-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 29. apríl 2021:
Tilmælið frá BýR 25-03-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.